# Teledepilin hjá Føroya Tele fullsettur



*Føroya Tele hevur savnað allar tænasturnar, kundin hevur brúk fyri, í Teledeplinum í Niels Finsensgøtu í Havn*

**TELE**
*Eirikur Lindenskov*

Í komandi viku kemur Føroya Tele á mál við nýggja Teledeplinum, sum felagið hevur latið upp í miðbýnum í Havn. Í Teledeplinum hevur Telebúðin húsast seinasta mánaðin, men nú verða allar tænastur hjá Føroya Tele savnaðar á sama stað.

Endamálið hjá Føroya Tele er at gera leiðina hjá kundanum meira beinleiðis, soleiðis at sleppast kann undn milumliðum. Tó ber framvegis til hjá kundum at venda sær til stovnin gjøgnum telefonina, men teir kunnu nú eisini hyggja framvið í gongugøtuni í Havn.

# Kópakonan á sjónleikararfestival í Lingen

**Tann 13. til 23. juni skal leikurin »Kópakonan« á stóran sjónleikarafestival í Lingen Í Týsklandi**

**SJÓNLEIKUR**
*Tíðindaskriv*

Festivalurin byrjar 14. juni, og setanin verður á stadion í Lingen, har øll londini masjera inn, akkurát sum tá tað er ítróttarstevna. Á festivalinum eru fimm heimspartar umboðaðir, og tað eru børn, úr 8 ár til 17 ár, úr 22 londum, ið øll skulu vísa hvørjum øðrum og almenninginum leikir, tey hava vænt til endamálið. Leikirnir verða framførdir í tveimum stórum sjónleikarhúsum, og tað vera 2 ella 3 leikir sýndir næstan hvønn dag.

Leikurin, sum føroyingarnir fara at leika, er Kópakonan, ein teatur og dansi leikur. Føroyska sagnið »Kópakonan« er grundarlagið, og børnini hava saman við leikstjóranum improviserað seg fram til gongdina. Dansin hevur Rannvá Justinussen staðið fyri og Jóan Petur Andreasen hevur gjørt tónleikin. Leikurin varar umleið 45 minuttir.

Umleið 500 børn vera á festivalinum, og tey verða innkvarterað privat 2 og 2, so høvið verður til at royna at liva saman við familjum í Lingen. Nógv annað enn sjónleikur er á skránnið, tað vera útferðir, drekaflúgving, workshops, diskotek, veitslur og annað spennandi fyri bæði børn og vaksin hesar 10 dagarnir vit eru í Týsklandi.

Ferðalagið eru 22 børn, 13 til 15 ár, og 5 vaksin. Tey vaksnu eru 2 teknikkarar, ein leikstjóri og 2 foreldur sum skulu ansa básinum um Føroyar í eini Kulturpark í Lingen. Básurin hjá okkum hevur nógv spennandi tilfar um Føroyar, bæði handaligt so sum føroyskt design og eisini tilfar um okkara nútímans samfelag, tøkni, fiskivinnu og annað. Okkara børn skulu eisini luttaka í undirhaldi á básinum við føroyskum dansi og dansispølum.

Heimasíðan hjá festivalinum er hendan: http://www.weltkinder-theaterfest.de/



*Teir 22 leikararnir í Kópakonuni, sum skulu á sjónleikarafestivalin »Let's fly« í týsklandi*

# Fogh fegnast

**Anders Fogh Rasmussen hevur sent eina heilsan til løgmann í sambandi við nýggja landsstýrið**

**POLITIKKUR**
*Heri á Rógvi*

Eftir at teir fýra flokkarnir høvdu undirskrivað samgonguskjalið var móttøka í Tinganesi, og fitt av fólki nýtti høvið til at heilsa løgmanni og landsstýrismonnum til lukku við samgonguni.

Eisini frá donsku stjórnini var komin ein heilsan. Anders Fogh Rasmussen, danskur forsætisráðharri, ynskti í skrivi nýggja føroyska landsstýrinum og nýggju føroysku samgonguni tillukku.

Forsætisráðharrin er í skrivi eisini positivt innstillaður uppá, at halda fram, har tað varð sloppið undan valinum.

– Eg gleði meg til, at (danska, blðm.) stjórnin og Føroya landsstýri halda fram við tí góða samstarvinum, vit eru farin undir. Stjórnin leggur sera stóran dent á, at vit í einum opnum, beinleiðis og virðiligum umhvørvi kunnu tosa um tey mál, sum ta næstu tíðina eru á skránni millum Føroyar og Danmark, sigur Anders Fogh Rasmussen.

Danski forsætisráðharrin heldur felagslýsingina, ið varð gjørd í januar, tá forsætisráðharrin vitjaði, hava stóran týdning.

– Stjórnin er positivt innstillað yvirfyri at tosa um landsstýrissins ynski um fleiri yvirtøkur innanfyri rammurnar av tí felagslýsing, ið løgmaður og forsætisráðharrin undirskrivaðu í januar í ár, sigur Anders Fogh Rasmussen.

*Anfinn Kallsberg við skrivborð sítt í Tinganesi við heilsanini frá Anders Fogh Rasmussen á borðinum*
*Mynd: Jan Müller*



# Tórshavnar Manskór í Vesturkirkjuni

**Sunnudagin, 9. juni kl. 20, hevur Tórshavnar Manskór summarkonsert í Vesturkirkjuni, undir leiðslu av Bjarna Restorffs og Hans Iversen**

**KONSERT**
*Heri á Rógvi*

Tórshavnar Manskór hevur millum ár og dag gjørt ikki so lítið um seg, og kórið er framvegis rættiliga virkið. Sunnudagin verður summarkonsert í Vesturkirkjuni. Skráin er fjøllbroytt við útlendskum og føroyskum tilfari. Nevnast kunnu sangir úr Ruslandi, Georgia, Týsklandi, Svøríki, Englandi og Føroyum. Fleiri teirra eru ikki framførdir í Føroyum áður. Ein av sangunum, Skygni hjá Kára P., verður framførdur saman við strúkarum, saksifon og trummum. Tá yrkjarin er uttanlands, verður tað Karl Martin Samuelsen úr Klaksvík, ið syngu solo og leikar guitar. Karl Martin syngur eisini egna sang sín Louis, saman við manskórinum.

Av øðrum solistum kunnu nevnast Petur Niclasen, tenor, og Fróði Sandoy, bass, ið syngja tveir russiskar tekstir.

Sum heild er skráin fjølbrott og nakað øðrvísi enn vanligt, verður sagt.

Kórleiðararnir eru kendir í Føroyum. Bjarni Restorffs hevur stjórnað kórinum síðani stovnanina. Hann kann líta aftur á stór avrik, kórið hevur framt í útlendskum kappingum.

Hans Iversen er nýggjur kórleiðari hjá manskórinum. Hans Iversen býr í Noregi og arbeiður sum musikk- og sanglærari í Føroyum í løtuni. Sangvenjingar hansara hava givið kórinum nýggjan íblástur í várhálvuni.

Sum heild er konsertin í Vesturkirkjuni sunnudagin kl. 20 øðrvísi enn undanfarin ár.



*Karl Martin Samuelsen er ein av solistunum sunnudagin, tá Tórshavnar Manskór hevur summarkonsert*



# Næraberg fer nú á sildaveiði



*Næraberg kom aftur av túri fríggjamorgunin. Hendan túrin vóru 80 fólk umborð, men nú farið verður á sild, verður manningartalið nakað minni.*



**Í nøgd hevur árið higartil verið slakari enn í fjør, men prísurin á surimi hevur verið uppeftirgangandi**

**FISKIVINNA**
*Vilmund Jacobsen*

Risatrolarin, Næraberg, er júst komin aftur av enn einum svartkjaftatúri.

Hendan túrin høvdu teir 340 tons av surimi og 170 tons av mjøli. Teir fóru avstað, 16. mai, og nú teir komu aftur, var túrurin ikki liðugur. Teir hava nevniliga valt at gera ein stuttan sildatúr, nú sild er at fáa norðanfyri.

Hendan seinasta túrin royndi Næraberg á markinum millum Føroyar og Ísland; teir royndu bæði í føroyskum og íslendskum sjógvi.

Á JFK-troli vænta tey ikki, at sildatúrurin verður langur, tí vertíðin varar í mesta lagi tríggjar vikur aftrat.

Umborð á Nærabergi verður sildin skorin til flak á sama hátt, sum teir gera umborð á Norðborg.

Tá ið Næraberg hevur verið sildatúrin, fer skipið aftur á svartkjaftaveiði.

## Slakari í nøgd

Um gongdina hjá Nærabergi í ár, sigur JFK-Trol, at svartkjaftanøgdirnar eru minni enn seinasta ár, men prísirnir á surimi hava verið betur og eru uppeftirgangandi.

– Tað eru tvinni viðurskifti sum gera, at nøgdirnar í ár eru minni. Í fyrsta lagi, at Føroyar onga avtalu fingu við ES um svartkjaftin og í øðrum lagi, at veðurlagið í vár var munandi verri enn seinasta vár, sigur JFK-Trol.

Næraberg liggur nú í Klaksvík og ger klárt at fara á sildaveiði. Farið verður avstað aftur mánadagin komandi.

Á seinasta túri vóru 80 fólk við skipinum, men nú farið verður á sild, verður manningartalið nakað minni.



# Nú eru svartkjaftaskipini í íslendskum sjógvi

**Krúnborg, Christian í Grótinum og grønlendski nótabáturin, Siku, hava landað til Havsbrún í vikuni**

**FISKIVINNA**
*Vilmund Jacobsen*

Føroysku svartkjaftaskipini royna nú eftir svartkjafti í íslendskum sjógvi. Tó er ikki vist, at tey ikki koma aftur í føroyskan sjógv at royna. Í fjør summar var mynstrið á leið tað sama sum í ár, og í juli mánaða tók fiskiskapurin seg uppaftur í føroyskum sjógvi; hendan mánaðin fingu skipini aftur nógvan svartkjaft í føroyskum sjógvi.

Á Havsbrún í Fuglafirði siga tey, at tað er so mangt, sum spælir inn, tá ið roynt verður eftir svartkjafti, eitt nú veðurlags-og streymviðurskifti.

– Men fyrst av øllum mugu vit rokna við, at svartkjafturin – eins og annar fiskur – stendur, har mest fæst er av føði, siga tey á Havsbrún.

Í fjør royndu svartkjaftaskipini í íslendskum sjógvi til út á heystið.

## Tríggjar landingar

Tríggir nótabátar hava landað til Havsbrún hesa vikuna.

Bæði Krúnborg og Christian í Grótunum høvdu fult skip; teir høvdu ávikavist 2500 og 2000 tons hvør.

Krúnborg landaði 200 tons av veiðini í Kollafirði.

Grønlendski nótabáturin, Siku, hevur eisini landað 1000 tons av sild til ídnað í Fuglafirði. Teir vóru fyrst í Noregi við lastini, har ætlanin var at landa veiðina til matna, men tað gekst ikki so væl. Tí endaði Siku, sum hevði verið uppi við Jan Mayen, í Føroyum.

Prísurin á sild til matna liggur um 3 kr. fyri kg., meðan prísurin á sild til ídnað er umleið 1,20.

Prísurin á svartkjafti í Føroyum liggur um 75-76 oyru.

# Arbeiða svartkalva, kongafisk og upsa á Tvøroyri

**Mánadagin komandi landar línubáturin, Hoyvíkingur, á Tvøroyri**

**FISKIVINNA**
*Vilmund Jacobsen*

Djúpvatnstrolarin, Rankin, garnabáturin, Ólavur Hvíti og snellubáturin, Brattanes, hava landað á Tvøroyri í vikuni.

Rankin hevði góðar 1500 kassar ella eini 150.000 pund av kongafiski, upsa og svartkalva. Fleiri keyparar vóru til lastina, men ein partur av veiðini endaði á gólvinum hjá Fiskavirking áTvøroyri.

Ólavur Hvíti, sum landaði hósdagin, hevði eini 40.000 pund av svartkalva. Umframt Fiskavirking á Tvøroyri, keypti Fiskasølan eisini ein part av veiðini hjá garnaskipinum.

## Góður túrur á Føroya Banka

Útróðrarbáturin, Brattanes, sum roynir við snellu, hevur eisini landað á Tvøroyri í vikuni. Teir vóru á Føroya Banka og høvdu nógvan og góðan tosk og nakað av upsa.

Á Tvøroyri siga tey, at veiðan hjá Brattanesi vá umleið 100.000 pund tilsamans. Fiskavirkið, Delta, keypti toskin, og Fiskavirking á Tvøroyri keypti upsan.

Tá ið vit frættu av Tvøroyri fríggjadagin, arbeiddu tey svartkalva á virkinum hjá Føroya Fiskavirking.

Línubáturin, Hoyvíkingur, landar ætlandi á Tvøroyri mánadagin.